**Jørgen Niclasen**
**landsstýrismaður**

**Svar**

**upp á**

**fyrispurning nr. 88/2014 eftir § 52a í tingskipanini frá Reimund Langgaard, løgtingsmanni, viðvíkjandi Leirvíkstunlinum**

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógv akfør koyra árliga ígjøgnum Leirvíkartunnilin?

2. Í hvussu nógvum av stóru tunlunum hoyrist útvarp ikki?

3. Hvussu nógv kostar tað at fáa útvarp í Leirvíkartunnilin?

4. Er landsstýrismaðurin samdur við spyrjaranum um, at tað betrar um ferðslutrygdina, um útvarp hoyrist í tunlinum?

5. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at fáa útvarp í tunnilin, og í so fall, nær kann væntast, at hetta verður liðugt?

**Svar**

Til nr. 1
Ferðsluteljingar vóru gjørdar í Leirvíkartunlinum í 2013, og var miðalferðslan 3.727 akfør um samdøgrið gjøgnum tunnilin, og sostatt samanlagt 1,36 mió. akfør um árið.

Til nr. 2
Leirvíkartunnilin er tann einasti av stóru tunlunum, har útvarpið ikki hoyrist.

Til nr. 3
Landsverk hevur kannað málið, og mett verður, at tað kostar umleið 400 tús. kr. at gera verkætlanina, soleiðis at útvarpið hoyrist í Leirvíkartunlinum.

Verkætlanin verður eftir ætlan framd eftir sama leisti sum í Kollfjarðartunlinum, sum merkir, at Landsverk og Mentamálaráðið fíggja og fremja verkætlanina í felag.

Til nr. 4
Tað at útvarpið hoyrist í tunlum er ætlað sum ein tænasta til borgarar, heldur enn eitt beinleiðis ferðslutrygdartiltak. Tað kann betra trygdina, at útvarpið hoyrist í tunlinum, soleiðis at bilførarar verða kunnaðir um møgulig óhapp, og hvussu teir skulu bera seg at í neyðstøðu.

Til nr. 5
Samskifti hevur verið millum Fíggjarmálaráðið, Landsverk og Mentamálaráðið um at finna eina loysn á málinum um fígging.

Miðað verður ímóti, at arbeiðið verður liðugt í ár, soleiðis at Útvarpið eisini hoyrist í Leirvíkartunlinum.

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður